## Vónandi skjótt klárur

Tað var ein dyggur smeitur fyri H71, tá Halgir Dahl Olesen tíðliga í dystinum mátti av vøllinum. Hugsingur var ikki um at taka lut aftur í dystinum, men sjálvur vónar Halgir ikki, at talan er um álvarsligan skaða. - Eg veit ikki ordiliga, hvat hendi. Eg leyp upp, og fekk eitt lítið skump, so eg setti skeivt av, og eg føldi okkurt í knænum. Eg havi havt mínar trupulleikar við knænum, men vónandi er hetta ikki serliga álvarsligt, segði Halgir Dahl Olesen eftir dystin sunnudagin.



## Áhugaður í Tottenham-spælarum

Nýggi venjarin hjá Real Madrid, Juande Ramos, var í heyst sekkjaður í Tottenham, og nú er hann hugaður at keypa tríggjar spælarar úr Tottenham. Sunday Telegraph skrivar, at Ramos er áhugaður í Roman Pavlyuchenko, Aaron Lennon og Didier Zokora. Harafturat er Ramos eisini áhugaður at keypa Ashely Young úr Aston Villa.

H71-Neistin 26-28 (16-14):

# Neistin betri undir trýsti

**Hoyvíkingarnir vórðu skerdir, tá teir mistu Halgir Dahl Olesen, men kortini hildu teir Neistanum í skák, til seinastu og avgerandi minuttirnir stóðu fyri framman**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Neistin tók sunnudagin eitt sera avgerandi fet í stríðnum um at vinna sær rætt til annað av plássunum í FM-finaluni í manshondbólti.

Sum kappingin hevur lagað seg, so hevur talan fyri tað nógva verið um kapprenning millum H71 og Neistan í stríðnum um at fylgja við oddaliðnum úr Vestmanna, og tí var lagt upp til sannan stórdyst.

Og verður tosað um intensitet, so livdi dysturin so ruddiliga upp til vónirnar.

### Mistu Halgir

Tað fekk stóran týdning fyri H71, at Halgir Dahl Olesen tíðliga noyddist av vøllinum við nógvari pínu í knænum. Hóast hann nú fyri tað nógva eisini er á strikuni, so tók skaðin nógv av skotstyrkini frá H71, sum tí fyri tað allar mesta noyddist at stríða seg heilt inn, áðrenn álopini vórðu endað.

Tí máttu teir nýta væl fleiri kreftir enn Neistin, sum við monnum sum Finnur Hansson og Áka Mørk eisini hevur skotstyrki frá bakkunum, og sum við einum sera væl uppløgdum Blagoje Buha eisini hevði spælaran, sum kundi seta beinleiðis mótstøðumannin av.

Men hetta fekk á ongan hátt hoyvíkingar at gevast. Tvørtur ímóti hóttu teir veruliga við at renna avstað, tá fyrri hálvleikur var á leið hálvrunnin. 8-10 varð broytt til 13-11, áðrenn Neistin aftur raknaði við, og eftir hetta hevði H71 fyri tað mesta tak á dystinum.

Men tað eydnaðist ikki at halda fast í hesum. Og kanska var missurin av Halgir júst ein orsøk til hetta. Vertirnir vóru støðug noyddir at brúka fleiri kreftir í sínum álopsspæli, og seinastu minuttirnar tóktist heilt útselt. Talan gjørdist nú bara um skot útifrá, og hesum hevði væl vaksna Neista-verjan ikki stórvegis trupulleikar av at verja fyri. Og so kundi David Edvardsen við tveimum kanónskotum av veinginum punktera spenningin í dystinum.



*Ingi Olsen spældi stóran part av dystinum á strikuni hjá Neistanum, men heldur ikki hetta hevði hondbóltsveteranurin stórvegis trupulleikar av*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Trýst á H71

Eitt er, at sigurin gav Neistanum fyrimun í kapprenningini við H71 um pláss í FM-finaluni.

Annað er, at hetta økir munandi um trýstið á hoyvíkingarnar. Teir hava higar til verið teir einastu, sum hava tikið VÍF, og nú er tað næstan krav, at talan verður um endurtøku, tá H71 komandi vikuskiftið spælir í Vestmanna.

### FAKTA um dystin

**H71-Neistin 26-28 (16-14)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 8-10
**40 min:** 18-19
**50 min:** 23-23
**Málskjúttar**
**H71:** Janus Sørensen 7, Dánjal Tórgarð 6(4), Johnny Durhuus 3, Esbern Patursson 2, Danni Syhler 2, Regin Joensen 2, Bjarni Sørensen 1, Bárður Brimvík 1, Halgir Dahl Olesen 1, Poul Kjartan Dam 1
**Neistin:** Finnur Hansson 6(2), Blagoje Buha 6, Áki Mørk 5, Karl Herup Olsen 4, Ingi Olsen 3, Tróndur Kragesteen 2, David Edvardsen 2
**Brotskøst:** H71 4, Neistin 3
**Útvísingar:** H71 4, Neistin 2
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (beinleiðis reytt)

StÍF-Kyndil 28-18 (13-11):

## Kyndil í botni

Í botninum hevur spenningurin í bestu kvinnudeildini í hondbólti snúð seg um tvídystin millum StÍF og Kyndil.

Við sigri í Havn fyrr í heyst hevði StÍF vunnið sær fyrimun í hesum stríðnum, og í gjár var so als eingin ivi, tá Kyndil vitjaði á Skála. Úrslitið gjørdist ikki minni enn 28-18 sigur til heimaliðið, sum soleiðis ruddiliga staðfesti, at tær als ikki vilja blandast ov nógv í botnstríðið. Um tær so megna at toga seg longur uppeftir, er ein annar spurningur, og higar til hevur gingið striltið við at fáa nakað burtur úr móti Tjaldri og Neistanum, sum liggja á næstu plássunum.

**-mørk**

StÍF-Kyndil 23-23:

## Aftur stig til Kyndil

Mansliðið hjá Kyndli hevur ikki havt tað so øgiliga lætt í vetur, men í gjár bragdaði aftur hjá liðnum.

Hesa ferð vitjaði Kyndil hjá StÍF, ið var einasta liðið, sum Kyndil hevði tikið stig frá undan dystinum sunnudagin.

Og tað eydnaðist aftur hesa ferð hjá teimum grønu at gera ein vørr. Við stiginum hevur Kyndil nú togað seg ájavnt KÍF í botninum av talvuni.

StÍF misti hinvegin enn eitt fet í kapprenningini við Neistan og H71, sum nú tykjast hálvgum einsamøll í dystinum um at vinna rætt til plássið sum nummar tvey – og harvið eisini plássi í FM-finaluni.

**-mørk**

KÍF-VÍF 21-24 (9-12):

# Vestmenningarnir halda stílin

### FAKTA um dystin

**KÍF-VÍF 21-24 (9-12)**
**10 min:** 1-4
**20 min:** 6-7
**40 min:** 12-15
**50 min:** 18-19
**Málskjúttar**
**KÍF:** Andreas Nielsen 4, Pætur Johansen 4, Jákup Trúgvason 4, Røgvi Weihe 3, Ási Dam 2(2), Regin Petersen 1, Niclas Reginsson 1, Teitur Joensen 1, Suni Johannesen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 8, Joen Pauli Høgnesen 3, Karl Johan Durhuus 3, Bjarti HJansen 2, Rúni Joensen 2(2), Niels Andreasen 2, Áki G. Olsen 2, John Zachariassen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, VÍF 3
**Útvísingar:** KÍF 2, VÍF 4
Dómarar: Karstin Joensen & Kristian Joensen

**Hóast KÍF royndi at arga, so var eingin slingur í valsinum hjá VÍF, sum framvegis heldur rimmarfast um oddasessin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gongur framvegis við fullari ferð hjá besta mansliðnum hjá VÍF.

Frá fyrsta kappingardegi hava vestmenningar sett seg á oddasessin í Atlantic Airways-deildini, og sunnudagin gjørdist aftur talan um sigur.

Hesa ferð var tað móti grannunum úr Kollafirði, at dysturin stóð, og eini grannauppgerð so líkt, so var intensiteturin alla tíðina í dystinum.

VÍF var tó fyri tað mesta liðið, sum var omaná, men tað var ongan tíð soleiðis, at teir veruliga kundu kanna sær bitan. Eitt skifti vóru kollfirðingarnir enntá á odda, men fyri tað mesta var munurin millum liðini eini tvey-trý mál.

Við sigrinum heldur VÍF framvegis fast um oddasessin, har teir nú hava 14 stig fyri átta dystir. Fyrst og fremst ræður um at halda seg millum tey bæði fremstu í deildini, og tað gjørdi ikki lagið verri, at H71 hesa ferð misti stig, soleiðis at munurin niður til triðja plássið øktist upp í fýra stig.

Kollfirðingar eru framvegis í tunga endanum av talvuni saman við Kyndli, men hóast teir neyvan koma at spæla um heiðursmerki í ár, so hevur liðið fleiri ferðir prógvað, at teir kunnu geva øllum í deildini ein skarpan gang.